

www.oljan.fo

**Jan Müller** 11 - 11 - 2011

# Oljuprísurin kann fara upp í 150 dollarar

Altjóða orkustovnurin, International Energy Agency, roknar við, at prísurin á ráolju fer at hække støðugt tey næstu 25 árini, og at prísurin fer at koma upp á 150 dollarar fyri tunnuna um stutta tíð. Hetta stendur at lesa í einari nýggjari frágreiðing, har stovnurin ger sínar metingar um framtíðarútlitini á orkuøkinum. Sagt verður, at fíggjartrupulleikarnir í fleiri londum í Vesturheiminum fara at halda prísinum niðri eina tíð enn, og harafturat fer tað eisini at tálma prísinum, at Libya fer at framleiða olju aftur aftan á kríggið. Hinvegin fer eftirspurningurin eftir olju at veksa munandi og serliga í teimum sokallaðu nýggju búskaparveldunum, har støðugt fleiri og fleiri fáa sær bil. Metingin hjá IEA er, at eftirspurningurin eftir olju fer at veksa úr 87 milliónum tunnum um dag í ár í 99 milliónir tunnur um dagin í 2035. ? ?